Ítróttar
Sosialurin
Nr. 80 • mikudagur • 26. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bjarni vann FM fyri fyrstu ferð




*Bjarni Skaalum føroyameistari í billard*

**26 ára gamli Bjarni Skaalum er fyri fyrstu ferð blivin føroyameistari í billard fyri einstaklingar. Hann vann finaluna á fleirfaldað føroyameistaranum Henrik Petersen**

BILLARD
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Bjarni Skaalum gjørdi bart í FM-kappingini í billard, sum varð hildin í Havn um vikuskiftið. 26 ára gamli Kaggaspælarin, sum hevur spælt billard seinastu 14 árini, vann fyri fyrstu ferð føroyameistaraheitið fyri einstaklingar.

Hetta hendi í frálíku billardhølunum hjá Havnar Klubba leygardagin, og mótstøðumaður í finaluni varð eingin minni enn "Mr. Billard himself", Henrik Petersen, sum hevur vunnið FM heitið so oftani, at tað er ringt at hava tal á tí. Hesaferð var Henrik ov stuttur.

Hóast tølini ikki vóru av teimum allar bestu, so var talan um eina spennandi og javna finalu. Bjarni fekk 454 eygu og Henrik 418. Í dystinum um 3. plássið gjørdist Niels Nielsen vinnari, til stóra gleði fyri the grand old man í føroyskum billardspæli - faðirin Eirik Nielsen hevur verið ein av okkara bestu spælarum nakrantíð. Hetta er so eisini besta úrslitið hjá Niels higartil og má sigast, at hann nú eisini er við at nærkast toppinum. Hann vann á Carsten Hansen. Dysturin teirra millum var eisini javnur, 474 móti 422 eygum.

### Vunnið allar kappingar

Tað var eitt sindur óvæntað, at ein av føroyameistarunum seinastu árini, Krisjan Suni Høgnesen, ikki náddi til endaspurtin. Hann varð útsligin í innleiðandi umfarinum fríggjadagin saman við Jan Müller, Sonhard Johannesen og Jógvan Jørgensen.

Eftir tað vann Bjarni á Niels og Henrik á Carsten, og harvið komu vinnararnir at dystast um 1. og taparanir um 3. pláss.

Bjarni Skaalum hevur við hesum meistaraskapinum vunnið allar kappingarnar, sum verða spældar her á landi. Hann gjørdist eisini føroyameistari fyri lið í ár saman við liðfeløgunum Steinbirni í Dali og Jan Müller.

Í aðru deild í billard fyri lið vann Kaggin eisini. Sostatt vunnu kaggamenn allar FM kappingarnar í ár.

# Argjagenta vinnur heiðursmerki í Miðeystri




*Gyðja á Argjahøvda vann heiðursmerki í ítróttarkapping í Cario*

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í døgunum frá 6. til 8. apríl kappaðust umleið 500 ungfólk frá 16 altjóða skúlum í frælsum ítrótti í Cario. Ungfólkini komu úr Dubai, Bahrain, Oman, Yemen, Qatar, Kuwait og øðrum londum í Miðeystri, og kappingin varð hildin á Cairo American College í egyptiska høvuðsstaðnum.

Hetta er eitt árligt tiltak, har endamálið er at lata ungfólk við ymsum uppruna og mentan kappast í somu kappingum.

Á vinnandi liðnum hjá Cairo American College var argjagentan Gyðja á Argjahøvda. Hon vann silvur á 100 metrum, og hon vann tvey gullheiðursmerki í stafettum saman við liðfeløgunum. Gyðja býr í løtuni í Egyptalandi.

Kappingin var sera væl fyriskipað, og endamálið at lata ungfólk við ymsum húðaliti, átrúnaði og mentan kappast saman var nátt á besta hátt.

Ítróttarsosialurin
– vit eru har tað hendir

